## Kuhn var nøgdur

Um vikuskiftið hevði Allan Kuhn fyrstu ferð leiðsluna av danska meistaraliðnum AaB, og hann var væl nøgdur við sínari spælarar eftir dystin ímóti Randers, sum endaði við javnleiki. - Vit funnu stríðsandan framaftur, og spælararnir eiga at verða nøgdir við sítt avriki í dag, segði Kuhn eftir dystin. AaB var á odda 2-1, tá vanliga leiktíðin var farin, men í yvirtíðini eydnaðist tað Randers at javna.



## Ronaldo heldur fram í United

Áhaldandi søgur hava gingið um, at Ronaldo skuldi skifta úr Manchester united til Real Madrid, men hetta tykist nú ósannlíkt. Real Madrid hevur viðgingið, at teir neyvan fáa fatur á Ronaldo, og høvuðspersónurin sjálvur hevur nú gjørt vart við seg. - Bara Gud kennir framtíðina, men eg rokni við, at eg spæli í Manchester United næsta ár eisini. Eg havi tikið røttu avgerðina, og eg eri United-spælari í sinni og skinni, sigur Ronaldo við spanska blaðið Marca.

B36-B68 2-1 (0-1):

# Róaldur tryggjaði B36 bronsuna



*Fagnaðurin var stórur, tá Róaldur Jacobsen í yvirtíðini skeyt bronsuna í føvningin hjá sær og liðfeløgunum*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

B36

B68

**NSÍ sá leingi út til at fáa gleði av bronsuheiðursmerkjunum, men í yvirtíðini skoraði unga stjørnuskotið, 17 ára gamli Róaldur Jacobsen, sítt seinna mál, og tryggjaði B36 2-1 sigur á B68 og harvið eisini bronsuna**

FÓTBÓLTUR
*Pætur Albinus*
*patur@sosialurin.fo*

Ikki var spælandi nógvastaðni í landinum, men í veðurgóða Gundadali var við góðum vilja spælandi. B36 hevði eina trupla uppgávu leygardagin. Hvørki leikarar, dómarar ella áskoðarar lótu veðrið vinna á sær, og spælandi fótbólt lótu øll veður vera veður.

B36 skuldi verja bronsuplássið, og skuldi tað gingið galið, lá NSÍ og lúrdi beint aftanfyri. Og hetta skuldi ikki gerast nøkur løtt uppgáva hjá B36, sum var menn sum Jákup á Borg, Herbert í Lon Jacobsen, Dimitrije Jankovic og Meinhard Joensen fyri uttan. Samstundis stóðu teir yvir av Føroya besta liði á útivølli, har B68 nevniliga undan dystinum hevði vunnið heili 22 út av teirra 36 stigum á útivølli.

### Vindurin spældi við

Eins og í restini av landinum var vindurin nógvur, hóast hann helst ikki var eins nógvur, sum nógva aðarastaðni. Hetta, umframt nógvi kuldin, gjørdi ikki umstøðurnar til fótbólt serliga góðar, og í fyrra hálvleiki vóru tað gestirnir úr B68, sum fingu fyrimun av nógva viðvindinum.

Og tað vóru ikki farnir fleiri enn átta minuttir, tá ið B68 heldur óvæntað hevði lagt seg á odda. B68 hevði vunnið sær hornaspark í høgru síðu, og frísparksskotið hjá Jann Inga Petersen sigldi allan vegin í málið til 1-0 til B68.

B36 hevði stórar trupulleikar við at fáa spælið at hanga saman, og tá ið nærkaðist málinum, bardust teir ímóti nógva mótvindinum. B68 hevði betri tamarhald á støðuni, og uttan nevniverdar málmøguleikar kundu liðini fara til hálvleiks við støðuni 1-0 til B68.

### Róaldur og Róaldur

Í seinna hálvleiki var trýstið á B36, tí teir høvdu møguleikan at avgera bronsuna sjálvir. Hugt at fyrra hálvleiki, skuldi veruliga vend koma í, um teir skuldu gera sær nakað far um at vinna dystin. Nú høvdu teir tó undanvindin við sær, og hetta kundi nýtast sum eitt amboð.

Tíggju minuttir inn í seinna hálvleik fekk B36 eisini bóltin í netið, men málið varð kolldømt vegna rangstøðu. Hetta bar boð um, at B36 veruliga vildu vinna. Teir høvdu nú takið á dystinum, og fingu nógv hornaspørk, sum kundu gerast vandamikil orsaka av vindinum.

Tað var tó eitt væl spælt álop, sum fekk B36 inn aftur í dystin um miðjan seinna hálvleik. Alex dos Santos rak fram í vinstru síðu, haðani hann legði bóltin inn til Róald Jacobsen, sum trygt førdi bóltin í málið til 1-1.

Stór gleði á B36-arunum, men teir vildu hava meir. Og tá ið teir hoyrdu í hátalarunum, at NSÍ var á odda 2-0 og lá til at fáa bronsuna, gjørdust teir ikki minni grammir. Hetta merkti tó ikki, at B68 ikki var við í dystinum. Teir høvdu bóltin nakað á miðjum vølli, men høvdu trupult við at spæla seg aftur um B36-verjuna.

Tað var líkt til at B36 mátti taka til takkar við 4. plássinum, men í sjálvari yvirtíðini varð bara 17 ára gamli Róaldur Jacobsen stóri bjargingarmaðurin, tá ið hann við sínum næsta máli skoraði til 2-1 og tryggjaði B36 bronsuna. Róaldur átti seinasta fótin á einum leysum bólti í feltinum, sum kom higar eftir hornaspark.

Gleðin var stór millum bæði leikarar og viðhaldsfólk hjá B36, tí bronsan, sum leingi sá út til at vera farin í vaskið, kortini kom til felagið – og hetta í allarseinasta minutti.

### Skyldaði liðnum hetta

Róaldur Jacobsen er bara 17 ár og nakrar mánaðar gamal, men hevur longu fingið sítt debut á U21-landsliðnum. Stórtalentið hevur eisini verið ein av berandi kreftunum á miðvøllinum hjá B36 í ár, og tey bæði málini í seinasta umfarinum tryggjaði B36 bronsuna.

- Hetta kendist væl. Eg føldi, at eg skyldaði liðnum hetta. Eg havi havt so nógvar málmøguleikar í ár, so einaferð mátti tað verða. Tað gjørdi tað als ikki verri, at málini fullu í dag, segði Róaldur eftir dystin.

Hann helt, at vindurin spældi ein stóran leiklut. Hvat gjørdi, at tit komu so væl aftur í dystin?

- Eg haldi at tað var mest vindurin, sjálvt um vit ikki høvdu eins nógvan viðvind sum B68. Vit frættu eisini at NSÍ var á odda, so vit máttu bara vinna, segði Róaldur, og staðfesti við hesum, at hann visti at hansara seinna mál gav B36 bronsuna.

Róaldur sigur, at teir í B36 eru nøgdir við eitt 3. pláss, tí top 3 var málsetningurin hjá unga B36-liðnum undan kappingarárinum.

**-pætur**

### Vit vóru betra liðið

Bill McLeod Jacobsen, venjari hjá B68, metir ikki, at betra liðið vann í Gundadali.

- Eg mátti gera nakrar justeringar á miðjuni í hálvleikinum, tí Ndende og Keita vóru so illa fyri í nógva kuldanum. B36 leggur trýst á okkum í seinna hálvleiki, og skora uppá eitt skot, sum fer undir verjuleikaran, sum skal fara eftir Róaldi. Tað seinna er ein returbóltur, sum kemur í Hanus og Róaldur so fær í málið. Vit dugdu ikki nóg væl at gera okkum dælt av vindinum, men eg haldi ikki, at B36 var betra liðið, segði Bill eftir dystin.

B68 hevur í ár verið besta lið í Føroyum á heimavølli, men samstundis næstvánaligasta á útivølli. Hvussu hongur hetta saman?

- Tað eru ymsar orsøkir. Onnur lið koma inn á Toftir við stórari virðing fyri okkum, og grava seg niður. Tá eru vit ikki dugnaligir til at skapa dystir. Vit undirhalda meir enn at levera, og tá gera vit nakað, sum vit ikki klára. Á útivølli dúva vit meira upp á kontra, og eg haldi vit hava mynstrað kontraspælið ótrúliga væl, sigur Bill.

Hann er væl nøgdur við hetta kappingarárið, men peikar á, at meira enn hetta eina árið í Formuladeildini skal til fyri at etablera seg. Hann metir seinna árið vera truplari, og peikar síðan á B71, sum nú aftur flytir niður.

**-pætur**